

Summi av klæðunum vóru meira eksotisk enn onnur
Mynd: Alexandar Djorovic



Onkur helt, at hetta var nýggja kollektiónin hjá IRF, men hetta vóru avbjóðandi og smart klæði til ungfólk
Mynd: Alexandar Djorovic

# Heitt og snøgt til veturin

Um vikuskiftið var nýggjast klædnamótin sýndur fram á mótasýningum í Klaksvík. Mótasýningarnar vóru í sambandi við sølustevnuna, sum var í KÍ-høllini.

Nógv fólk vóru til mótasýningarnar, sum vóru bæði leygardagin og sunnudagin, og tey sóu, hvussu tað ber til at lata seg í – frá innast til uttast.

Bæði børn og vaksin sýndu klæði fram, og tað vóru klæði av alskyns slagi at síggja. Litirnir vóru ikki so sterkir, sum teir plaga at vera um summarið, men klæðini vóru snøgg og fyri ein stóran part klassisk.

Hinvegin var eisini sumt, sum tað helst krevur eitt sindur av dirvi at lata seg í.



Litirnir vóru ikki so sterkir, sum teir ofta eru um summarið, men klæðini vóru snøgg fyri tað
Mynd: Alexandar Djorovic



Tað bar eisini til at fáa okkurt jólagávushugskot til betru helvtina
Mynd: Alexandar Djorovic



Heit og snøgg klæði
Mynd: Alexandar Djorovic



Móttøka




Í sambandi við útgávuna av nýggju tónleikaárbókini verður móttøka í 3´aranum í SMS fríggjadagin kl. 15.00. Øll eru vælkomin.

Sosialurin & pop.fo